KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar. Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 15.12.2022 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Herfrí J. Sørensen møtti fyri Jóhonnu C. Christiansen
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 115/22 | 22/00124-22 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Jóhanna C. Christiansen |
| 116/22 | 22/01878-4 | Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2023 |
| 117/22 | 21/01807-23 | Val av nýggjum nevndarlimi í Integratiónsnevndina fyri David Im |
| 118/22 | 22/01798-18 | Sjálvsognarst. undir Kráarbrekku – roknskaparviðurskifti og møgulig avtøka |
| 119/22 | 22/01949-1 | Umhvørvislig atlit takast við í øll tilmæli og mál hjá kommununi - HeiN |
| 120/22 | 21/01716-29 | Bygdarætlan fyri Svínoy eftir almenna hoyring í vár |
| 121/22 | 22/00825-8 | Uppskot til navn til part av Dalsgøtu á Syðradali |
| 122/22 | 22/01578-2 | Marknaumskipan innan- og uttangarðs - matr.nr. 6 og 16 í Árnafirði |
| 123/22 | 22/01978-3 | Marknaumskipan - matr.nr. 200a, 197 og 200b |
| 124/22 | 22/01214-18 | Niðurtøka av Lávíkarbrekku 3 og 5 |
| 125/22 | 21/01263-8 | Skiftingarrúm til havsvimjarar |

***Óli M. Lassen fór av fundinum kl. 18:45 (beint eftir viðgerðina av máli 124/22)***

**Til viðgerðar**

## 115/22
## 22/00124-22 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Jóhanna C. Christiansen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 115/22 |

**22/00124-22 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Jóhanna C. Christiansen**

**Frágreiðing um málið:**
Jóhanna C. Christiansen, býráðslimur, hevur boðað frá, at hon hevur forfall til býráðsfundin 15. des. 2022. Næstvaldi á listanum fær ikki møtt; triðjavalda á listanum er Herfrí J. Sørensen.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 18

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Jóhonnu C. Christiansen.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Einmælt samtykt at lata Herfrí J. Sørensen taka sæti í býráðnum til fundin.

## 116/22
## 22/01878-4 Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 116/22 |

**22/01878-4 Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2023**

**Frágreiðing um málið:**
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2023:

| | |
|---|---|
| 26. januar | 22. juni |
| 23. februar | 28. september |
| 23. mars | 26. oktober |
| 27. apríl | 23. november |
| 25. mai | 14. desember |

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir hósdag í býráðshøllini, Nólsoyar Pálsgøta 32, Klaksvík.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

*§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Einmælt samtykt at taka undir við teimum í tilmælinum, dagf. 28. nov. 2022, uppskotnu fundardøgunum fyri 2023, men í januar mánað 2023 endurskoða, um til ber at strika fundin í desember og heldur hava býráðsfund hósdagin 31. august.

## 117/22
## 21/01807-23 Val av nýggjum nevndarlimi í Integratiónsnevndina fyri David Im

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Integratiónsnevndin | 07.12.2022 | 11/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 117/22 |

**21/01807-23 Val av nýggjum nevndarlimi í Integratiónsnevndina fyri David Im**

**Frágreiðing um málið:**
David Im hevur tikið seg úr Integratiónsnevndini.

Í viðtøkunum fyri Integratiónsnevndina stendur: "Um nevndarlimur tekur seg úr nevndini, tekur Integratiónsnevndin støðu til nýggjan lim, í tráð við innstillingina hjá umsitingini. Í slíkum førum verður avgerðin tikin við atkvøðugreiðslu í Integratiónsnevndini. Valið verður síðani lagt fyri býráðið til góðkenningar."

Skotið verður upp, at Reni í Heimustovu, ið upprunaliga er úr Indonesia, tekur sessin hjá David Im í Integratiónsnevndini.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli:**
Mælt verður nevndini at taka undir við málinum.

**Integratiónsnevndin 7. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá Integratiónsnevndini 7. des. 2022 einmælt góðkent.

**118/22**
**22/01798-18 Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku – roknskaparviðurskifti og møgulig avtøka**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 06.12.2022 | 43/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.12.2022 | 101/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 118/22 |

**22/01798-18 Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku – roknskaparviðurskifti og møgulig avtøka**

**Frágreiðing um málið:**
Í tveimum umførum er Trivnaðarnevndin eldri & bústaðir kunnað um høvuðstølini í roknskapinum fyri 2021 hjá Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku.

Tørvur er á hesari nevndar- og býráðskunning og -viðgerð í sambandi við, at sjálvsognarstovnurin hevur selt Biskupstorg, sum er matrikkulerað sundur í tvær høvuðseindir: veghæddin, sum fevnir um útvent virksemi, varð seld til Klaksvíkar kommunu, og ovaru hæddirnar, sum fevna um 30 íbúðir, vórðu seldar til Bústaðir.

Roknskapurin fyri 2021 er klárur, men enn ikki formliga góðkendur av stýrinum fyri Kráarbrekku, av tí at roknskaparliga viðgerðin av søluni av Biskupstorg verður kannað. Í verandi uppskoti vísir raksturin tap upp á 26 mió. kr., tí virðisásetingin í skeytinum er lækkað við stovnsfænum. Spurningurin er, um ein heldur skal brúka bókaða virðið og harvið minka roknskaparhallið hjá sjálvsognarstovninum við 24 mió. kr.

Ein annar spurningur, sum er settur í hesum sambandi, er, um tað framhaldandi er tørvur á sjálvsognarstovninum, ella um løtan nú er komin – eftir skjótt 25 ár – at avtaka Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku.

Grundgevingarnar fyri hesum eru, at við søluni av Biskupstorg er Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku í dag uttan nakra fasta ogn, og hevur virksemi stovnsins seinastu árini verið merkt av hesum. Fundirnir eru fáir, og í løtuni eru ongar ítøkiligar ætlanir um nýggjar verkætlanir, tí samstarvið millum Klaksvíkar kommunu og Bústaðir fer í løtuni fram uttan um sjálvsognarstovnin.

Málið verður lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið at taka støðu til virðisásetingina í samb. við søluna av Biskupstorg og møguliga støðutakan til evt. avtøku av Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekku, samstundis sum kunnað verður um roknskaparligu og fíggjarligu støðu stovnsins, sum nærri verður greitt frá í skrivi frá umsitingini, dagfest 29-11-2022.

**Tilmæli:**
Málið verður við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir býráðsins og býráðið til umrøðu og møguliga støðutakan til evt. avtøku av Sjálvsognarstovninum undir Kráarbrekka, samstundis sum kunnað verður um roknskaparligu og fíggjarligu støðu stovnsins.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 6. desember 2022:**
Nevndin samtykti, at beina málið til stýrið fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku viðv. møguligari avtøku og at beina spurningin um virðisásetingina av ognini til fíggjarnevnd og býráð at taka støðu til.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2022:**
Nevndin mælir til, at keypsprísurin verður hækkaður til 27,772 mkr., sæð í ljósinum av, at hetta ikki hevur nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa.
Avtøka av sjálvsognarstovninum verður beind í stýrið fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku at avgreiða.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá FíN 13. des. 2022 einmælt samtykt.

## 119/22
## 22/01949-1 Umhvørvislig atlit takast við í øll tilmæli og mál hjá kommununi - HeiN

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 05.12.2022 | 68/22 |
| 2 Heilsunevndin | 05.12.2022 | 40/22 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2022 | 173/22 |
| 4 Mentanarnevndin | 06.12.2022 | 74/22 |
| 5 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 06.12.2022 | 62/22 |
| 6 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 06.12.2022 | 44/22 |
| 7 Havna- og Vinnunevndin | 07.12.2022 | 60/22 |
| 8 Tekniska Nevnd | 07.12.2022 | 98/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.12.2022 | 98/22 |
| 10 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 119/22 |

**22/01949-1 Umhvørvislig atlit takast við í øll tilmæli og mál hjá kommununi – HeiN**

**Frágreiðing um málið:**
Tá samgonga varð skipað eftir seinasta býráðsval, varð avrátt at seta á stovn eina nýskipaða Heilsunevnd, ið *hevur sum endamál at skapa góðar vanar og heilsufremjandi átøk fyri allar borgarar í Klaksvíkar kommunu. Nevndin skal eisini taka atlit til umhvørvið og arbeiða eftir einum grønum leisti*.

Eitt av stevnumiðunum hjá Heilsunevndin, sum eisini er orðað inn í samtyktu kommunustýrisskipanina hjá Klaksvíkar kommunu, er, at "*umhvørvið skal hugsast inn í okkara politikk*", og tað er í hesum sambandi, at heilsunevndarforkvinnan hevur heitt á umsitingina um at leggja hetta mál fyri politisku skipanina.

- - -

Í summar samtykti Klaksvíkar býráð at fara undir eina tilgongd, har arbeitt verður miðvíst við teimum 17 Heimsmálunum fyri burðardyggari menning. Endamálið er at arbeiða við burðardygd í allari kommununi, og at nevndirnar í býráðnum taka atlit til heimsmálini í síni viðgerð.

Tá varð samtykt, at fyrisitingin skal gera uppskot um, hvussu hetta arbeiðið kann skipast og grundfestast í tí umsitingarliga og politiska arbeiðinum. Samstundis er umráðandi, at tilvitskan um burðardygd verður kjølfest í arbeiðið beinavegin, bæði í politisku skipanini og í umsitingini.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrisskipan fyri Klaksvíkar kommunu ásetur í § 43 viðvíkjandi Heilsunevndini:
1. petti. Heilsunevndin er ein faknevnd innan partar av málsøkjunum hjá føstu býráðsnevndunum ...

2. petti. Heilsunevndin ... skal eisini taka atlit til umhvørvið og arbeiða eftir einum grønum leisti ...
4. petti. ... Innan eitt nú fylgjandi uppgávur og virkisøki hevur heilsunevndin tilmælandi heimildir ... *Matarskipan til øll børn, *Upplýsandi tilfar og samanhald, *Uttandura venjingar- og vælveruøki, *Virkin sum longst, *Fleiri trø í býarrúminum, *Sniðgøtur, gongubreytir og súkklubreytir, *Órudd, ljóð- og ljósdálking minkar um trivnaðin, *Umhvørvið skal hugsast inn í okkara politikk

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan er her um tilmæltar broyttar mannagongdir, sum krevja nakað av orku í umsitingini til at taka umhvørvislig atlit og seta orð á hesi í sambandi við skriving av tilmælum og politikkin sum heild.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður – umvegis Heilsunevndina – heitt á nevndir um í síni viðgerð av málum at taka atlit til burðardygd í mun til heilsu og trivnað, umhvørvið, veðurlag, undirstøðukervið, orku og lívfrøðiligt margfeldi, og á fyrisitingina um at gera uppskot um, hvussu hetta kann skipast og grundfestast í tí umsitingarliga og politiska arbeiðinum, herundir at tilevna ein dagførdan leist fyri øll tilmæli, ið verða løgd fyri nevndir og býráð, sum tryggjar, at umhvørvislig atlit verða tikin við í øll tilmæli og mál hjá kommununi.

**Heilsunevndin 5. desember 2022:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 5. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við HeiN 5. des. 2022.

**Mentanarnevndin 6. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 05-12-2022.

**Ferðslunevndin 6. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN 06-12-2022.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 6. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við FeN, dagf. 06.12.2022.

**Tekniska Nevnd 7. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við E&B, dagf. 06.12.2022.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við TN 07-12-2022.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá FíN 13. des. 2022 einmælt samtykt.

## 120/22
## 21/01716-29 Bygdarætlan fyri Svínoy eftir almenna hoyring í vár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Svínoyarnevndin | 02.12.2022 | 16/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2022 | 164/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 120/22 |

**21/01716-29 Bygdarætlan fyri Svínoy eftir almenna hoyring í vár**

**Frágreiðing um málið:**
Uppskot til byggisamtykt fyri Svínoy hevur ligið frammi til alment eftirlit í Miðlan í Klaksvík og í Dansistovuni í Svínoy frá 25. mars til 15. apríl 2022, somuleiðis varð lýst á heimasíðu kommununnar, portal.fo og í Norðlýsinum. Kærufreistin var úti 06.05.2022, og inn komu 11 viðmerkingar/kærur.

Serliga er tað viðmerkingin frá Tjóðsavninum, ið býarplansbólkurin hevur tikið til eftirtektar.
Tjóðsavnið vísir á nógv ítøkilig og áhugaverd støð, ið mann eigur at vísa serlig atlit til. Og tí eru stórar broytignar gjørdar í byggisamtyktini, serliga fyri F-økini (Frítíðarendamál). Nøkur F-økir eru slept, minkað og flutt.
Hetta er eisini gjørt fyri ikki at spenna bein fyri landbúnaðinum á oynni, sum mong hava ágóðan av, og samstundis rúma ynskinum hjá teimum, sum ynskja at byggja frítíðarhús.

Í gomlu býlingunum A34 úti í Bø og A35 heima í Bø verður lagt upp til einans dagføring og endurreisan av bygningum, og í serligum føri kann byggjast nýtt.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri nevnd til umrøðu og støðutakan.

**Svínoyarnevndin 2. desember 2022:**
Viðmerking til 21/01617-11: Nevndin mælir til at ganga ynskinum frá JEáG á møti, sum er 25 metrar tvørturvið vegnum og uml. 40 metrar inn frá vegnum.
Viðmerking til 21/01617-17: Nevndin mælir til, at fyrisitingin ger eina ætlan um avmarkaða bygging í parti av økinum, sum friðingarmyndugleiki og tjóðsavnið kunnu viðmæla.
Viðmerking til 21/01617-25: Nevndin mælir til, at fyrisitingin ger eina ætlan um avmarkaða bygging í parti av økinum, sum friðingarmyndugleiki og tjóðsavnið kunnu viðmæla.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 5. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 2. des. 2022.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá UBN 5. des. 2022 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 121/22
## 22/00825-8 Uppskot til navn til part av Dalsgøtu á Syðradali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Syðradalsnevndin | 30.11.2022 | K-3/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 06.12.2022 | 73/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 121/22 |

**22/00825-8 Uppskot til navn til part av Dalsgøtu á Syðradali**

**Frágreiðing um málið:**
Á fundi hin 11-11-2022 hevur Gøtunavnanevndin soljóðandi tilmæli til avvarðandi nevndir og býráð viðv. navni til vegastrekkið frá Gjónni og norðureftir:

> "Nevndin tekur undir við uppskotinum frá Syðradalsnevndini, sum mælir til navnið **við Gjónna**"
> Nevndin leggur afturat, - um møguleiki er fyri tí, - at so navnið við Gjónna kemur at umfata strekkið millum Gjónna og bøgarðin, meðan strekkið víðari norðureftir – til Kalsoyarveg – fær navnið Syðradalsvegur.




**Tilmæli:**
Vísandi til §28, stk 5 og § 41, stk. 1 í Kommunustýrisskipanini, verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið mentanarnevndini og býráðnum til viðgerðar og støðutakan.

**Syðradalsnevndin 30. november 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Mentanarnevndin 6. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-11-2022.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá MeN 6. des. 2022 einmælt samtykt.

## 122/22
## 22/01578-2 Marknaumskipan innan- og uttangarðs - matr.nr. 6 og 16 í Árnafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Árnafjarðarnevndin | 29.11.2022 | 10/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2022 | 167/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 122/22 |

**22/01578-2 Marknaumskipan innan- og uttangarðs - matr.nr. 6 og 16 í Árnafirði**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 6 og 16 í Árnafirði. Umskipanin ber í sær, at matr.nr. 6 letur alla uttangarðsjørðina og uml. 475 $m^2$ innangarðs til matr.nr. 16.

Niðanfyri er lýst íblandaðu matriklar áðrenn og aftaná umskipan



Verandi matrikulviðurskifti



Matrikulviðurskifti eftir umskipan

**Lógargrundarlag:**
Matrikulógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini

**Árnafjarðarnevndin 29. november 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 15-11-2022.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 5. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við Árnafjarðarnevndini 29. nov. 2022.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá UBN 5. des. 2022 einmælt samtykt.

# 123/22
# 22/01978-3 Marknaumskipan - matr.nr. 200a, 197 og 200b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2022 | 162/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 123/22 |

## 22/01978-3 Marknaumskipan - matr.nr. 200a, 197 og 200b

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður tann 17-11-2022 um kommununnar ummæli til umsókta marknaumskipan millum omanfyri nevndu matriklar.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
- Byggisamtyktarliga er talan um lendi í økisparti A15.
- Norðurmarkið verður tillagað í mun til verandi garð á staðnum
- Vesturmarkið verður flutt uml. 72 $m^2$ longur niðan.




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Umsóknin  er í tráð við Almennu Byggisamtyktina og verður tí mælt til at viðmæla.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 5. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-11-2022.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Tilmælið frá UBN 5. des. 2022 einmælt samtykt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 124/22
## 22/01214-18 Niðurtøka av Lávíkarbrekku 3 og 5

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2022 | 163/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 124/22 |

**22/01214-18 Niðurtøka av Lávíkarbrekku 3 og 5**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til býráðssamtyktina 29/09-2022, har umsitingin varð biðin at fáa eina byggifrøðiliga meting av standinum av húsunum. Í tí sambandi setti umsitingin seg í samband við Fróða K. Sundsskarð, tilnevndur byggikønur og góðkendur sbrt. *kunngerð nr. 80, frá 06. juni 2014, §3,* at fremja eina húsaskoðan og støðufrágreiðing.

Niðurstøðan hansara er í báðum húsaskoðanunum tann sama *"Fýrur er í húsunum sum hevur undirminera fleiri bygningslutir, at tey eru í so ringum standi, at alt eigur at vera gjørt av nýggjum".* Húsaskoðanin kemur sostatt fram til somu niðurstøðu sum metingin hjá fyrisitingini.

Vegna vantandi heimild viðvíkjandi varðveiting kann kommunan ikki nokta niðurtøku, men ístaðin eggja umsøkjara til at varðveita grótlaðing og skjøldrar, í tann mun tað letur seg gera í mun til ætlaðu verkætlanina.

Kommunan hevur ongar ítøkiligar ætlanir við nevndu matriklum.

**Lógargrundarlag:**
Eingin varðveitingarskylda er lýst yvir ognina.
Almenna byggisamtyktin, A5 og BK17

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at loyva niðurtøku av bygninginum, tí sambært BK17 er einki, ið forðar fyri at játta umsóknini.
Tekniska fyrisiting mælir eisini til, at Norðoya Fornminnasavn kann taka stig til at uppmála og dokumentera ognina áðrenn niðurtøku.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 5. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 25-11-2022.
ASB tekur støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
*Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Atkvøtt varð um tilmælið frá UBN 5. des. 2022; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, HJS, EÓP, TJL og ÓML) og 1 atkvøðu ímóti (ASB). JS atkvøddi ikki.

*Óli M. Lassen fór av fundinum kl.18:45*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 125/22
## 21/01263-8 Skiftingarrúm til havsvimjarar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 05.12.2022 | 69/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2022 | 174/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 06.12.2022 | 75/22 |
| 4 Havna- og Vinnunevndin | 07.12.2022 | 65/22 |
| 5 Tekniska Nevnd | 07.12.2022 | 100/22 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2022 | 125/22 |

**21/01263-8 Skiftingarrúm til havsvimjarar**

**Frágreiðing um málið:**
Fundur var við umboð fyri Havsvimjarafelagið og Saunagos um støðuna við bygging av skiftingarrúmi í nov. 2022. Tekningar av støðumynd og av bygningi vórðu vístar, og tóku umboðini væl ímóti uppskotinum.



*Staðsetan av neysti*

*Byggimál:*
Tað er tekniska fyrisiting, sum hevur staðið fyri myndugleikasettinum í samband við umsókn um byggiloyvi. Neystið verður 22 $m^2$ til støddar. Mátini eru 3,31 m x 6,62 m og yvirheldur mest loyvdu hædd í mun til miðal jørðildi á 4,5 m. Vangar verða stoyptir, og tekjan og skjøldrar ein timburkonstruktión.

Fyrisitingin hevur gjørt avtalu við veitara, at útgrevsturin kann byrja í desember, um øll loyvir fyriliggja.

*Marknaumskipan:*
Ætlan er at staðseta neystið undir liðini á matr.nr. 916.
Eftir núverandi viðurskiftum er neystið staðsett omaná matr.nr. 163a og 840d, hetta ynskir mann at broyta, so at neystið fær ein sjálvstøðugan matrikul.




*Marknaumskipan*

Broytingin hevur við sær at:

- matr.nr. 840d minkar við 14,5 m$^2$ (10,2 m$^2$ og 4,3 m$^2$)
- matr.nr. 163a minkar við 11,7 m$^2$. Teir 4,3 m$^2$, ið matr.nr. 840d minkar, verða lagdir aftrat matr.nr. 163a
- 22 m$^2$ blíva útlagdir til nýggjan matrikul til neyst.

Klaksvíkar kommuna er eigari av matr.nr. 163a og 840d og verður somuleiðis eigari av nýggja matriklinum.

**Lógargrundarlag:**
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu – D1 (Fríøki, støða verður tikin til neystabygging í hvørjum einstøkum føri, og skulu friðingarmyndugleikar hoyrast.)
Løgtingslóg um um matrikulering og sundurbýti v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kr. 400.000,- eru játtaðar til hesa verkætlan í 2022, ið væntandi røkkur til innilokan.
Samlaði kommunali parturin av verkætlanini er mettur til 500 tús.kr. Ongin peningur er avsettur í 2023, hetta tí at feløgini, Havsvimjarafelagið og Saunagos, standa fyri innrættingini sjálvi og fígging av hesum.

**Tilmæli:**
- Fyrisitingin mælir til at loyva neystabygging, treytað av, at friðingarmyndugleikarnir góðkenna byggiætlanina.
- Fyrisitingin mælir til umskipanina millum 163a og 840d og stovnan av nýggjum matrikli.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 5. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 30-11-2022.

**Mentanarnevndin 6. desember 2022:**
Nevndin tekur undur við UBN, dagf. 30-11-2022.

**Ferðslunevndin 6. desember 2022:**
Nevndin mælir til, at tekniska fyrisiting lýsir ferðsluligu ávirkanina gjøllari, áðrenn støða verður tikin.
Málið verður at leggja fyri aftur fyrstkomandi nevndarumfar.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Havna- og Vinnunevndin 7. desember 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN og UNB 06.12.2022. Nevndin mælir til, at verkætlanin verður framd sum skjótast.

**Tekniska Nevnd 7. desember 2022:**
Ein meiriluti, OáL, ÓML, EyÓP og TJL, tekur undir við tilmælinum og mælir til, at ferðsluávirkan verður lýst til býráðsfundin.
Ein minniluti, ASJ, heldur fast við samtyktina í HaVN 07.12.2022.

**Klaksvíkar Býráð 15. desember 2022:**
Atkvøtt varð um tilmælið dagf. 30. nov. 2022; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (ASJ, GvK, OáL, HJS, EÓP, ASB, JS, SVJ og TJL) og ongari ímóti. KHJ atkvøddi ikki.

---

Fundurin lokin kl. 19:45

Karl Johansen

Atli S. Justinussen

Jógvan Skorheim

Gunvá við Keldu

Oddmar á Lakjuni

Herfrí J. Sørensen

Eyðstein Ó. Poulsen

Annika S. Biskopstø

Óli M. Lassen

Signhild V. Johannesen

Tummas J. Lervig